

*Vit hava vant okkum við, at ein kann tosa í telefon, uttan at annar enn tann, sum er í hinum endanum, hoyrir, hvat tosað verður um. Men í framtíðini kann eftirlitið lurta eftir okkum og skráseta rødd okkara*

# Big Brother is watching you

Amerikanararnir eru í ferð við at gera eina skipan, sum skal halda eyga við fólki. Endamálið er at leita eftir yvirgangsfólki bæði í USA og uttanlands, men atfinningarsamar røddir ávara ímóti skipanini

EFTIRLIT
*Árni Joensen*

Undir leiðslu av einum manni, sum í 1990 varð dømdur sekur í at hava oyðilagt próvtilfar og fyri at hava logið í Kongressini fyri at dylja eina gølu í tíðini, tá Ronald Reagan var forseti, er USA farið undir eina nútímans eftirlitsverkætlan, sum skal avdúka sannleikan um fólk, sama hvar á Jørðini tey eru stødd.

"Tú ert undir illgruna!" skrivaði William Saffire í einari grein í New York Times nú um dagarnar. Hann og onnur, sum ivast í nýggju skipanini, halda, at tann gamla framtíðarmyndin hjá George Orwell um "Stóribeiggi sær teg" í bókini "1984" er einki at rokna samanborið við ta eftirlitsskipanina, sum nú er í gerð.

- Hetta fer at gera tað møguligt hjá myndugleikunum at sneyta í øllum privatlívinum hjá fólki, uttan at teimum nýtist at biðja um loyvi til tess, og uttan at teimum nýtist at hava tann minsta illgruna um, at viðkomandi fæst við nakað ólógligt, sigur American Civil Liberties Union í einari kunngerð.

Tann hátøkniliga jagstranin eftir yvirgangsmonnum skal í framtíðini gerast við at útvega og samkoyra milliardir av smáum kunningarbitum úr databankum og við at hava eftirlit við tí elektroniska samskiftinum. Hetta letur seg gera, tí í báðum førum ber til at síggja okkara fótaspor.

### Heimsumfatandi

Amerikanska verjumálaráðið, Pentagon, hevur ikki gjørt eina einastu roynd at dylja, at tann komandi skipanin umfatar allan heimin. Tá skrivarin í Pentagon, Edward Aldridge, herfyri varð spurdur, um USA ætlar at útvega sær atgongd til databankarnar í øðrum londum, svaraði hann alt fyri eitt játtandi. Hann legði tó afturat, at upplýsingar verða ikki savnaðar og viðgjørdar, uttan at neyðug loyvi eru fingin til vega fyrst.

Men tey atfinningarsomu eru ikki sannførd, minni enn so. Tey hava mælt politikarunum til at steðga verkætlanini alt fyri eitt, og atfinningarnar koma bæði frá høgru og vinstru. Á høgravonginum mótmæla tey, sum verja frælsið hjá tí einstaka, og á vinstravonginum koma mótmælini frá felagsskapum, sum verja rættindini hjá borgarunum. Felags fyri tey mótmælandi er óttin fyri, at upplýsingarnar verða misnýttar. Og tað hevur ikki gjørt mótmælini færri, at Pentagon alment hevur sagt, at ætlanin er eisini at nýta teldurnar til at finna fólk við at lata sjónvarpstól halda eygað við teimum.

- Tá verður eftirlitið fullkomið, siga tey mótmælandi.

### Vitan er vald

Orðini "Vitan er vald" eru rættiliga beinrakin, men tey eru eisini mong, sum síggja ein vanda í hesum sannleikanum, og tað hevur ikki bøtt um umdømið hjá amerikansku verkætlanini, at Pentagon hevur givið henni heitið "Total Information Awareness System", sum vit kunnu samanfata í orðið "alvitan".

Oddamaður fyri verkætlanini er John Poindexter, varaadmiralur, sum var fyri nógvum ákoyringum ta tíðina, hann var ráðgevi hjá Ronald Reagan, forseta. Poindexter hevði ein virknan lut í tí ólógliga amerikanska vápnahandlinum við Iran, hvørs pengar vórðu nýttir til ólógliga fígging til Contras, sum stríddist ímóti sandinistunum í Nicaragua. Aftaná varð hann dømdur seks mánaðar fongsul, men slapp frá at fara inn at sita dómin.

Nú hevur Bush-stjórnin valt at taka við hugskotinum hjá Poindexter, sum hevur útgangsstøði í teirri stóru kunningarmongd, sum vit lata eftir okkum hvønn einasta dag t.v.s. teldupostur, róður á alnótini, gjaldskort, kontoavrit frá bankunum, telefonnýtsla, lækna- og sjúkrahúsfrágreiðingar, vega- og tunnilsbummar og mangt, mangt annað. Harafturat kemur alt tað, sum teir ymsu myndugleikarnir longu vita um okkum so sum koyrikort, pass, vígslubræv og skilnaður, ognarviðurskifti, løgreglumál og so framvegis. Høvuðssetningurin er at savna og samkoyra allar hesar upplýsingar við tí góða endamáli at finna yvirgangsmenn og at forða fyri yvirgangsatsóknum.

### Verður roynd nú

Sambært skrivaranum í Pentagon, John Aldridge, fara hesar ovurstóru mongdir av upplýsingum at gera tað møguligt at leita eftir yvirgangsmonnum ella ymsum, sum kann avdúka samband við yvirgang. Aldridge segði fyri nøkrum døgum síðani, at ein partur av skipanini verður longu royndur, og eydnast royndin væl, fáa myndugleikar sum samveldisløgreglan FBI atgongd til skipanina, segði hann.

Fleiri trupulleikar eru tó eftir at loysa. Ein teirra er tann málsligi, og tí verður nú roynt at menna eina tøknifrøði, sum kann týða tey nógvu fremmandu málini, og sum eisini skal týða skjótt. Samstundis verður arbeitt við at menna skipanina, so hon skal verða før fyri at kenna røddina á fólki aftur, hevur hon hoyrt hana einaferð.

Ein annar trupulleiki, sum heldur ikki er loystur enn, er at fáa skipanina at fata, nær samband kann vera millum ymsar gerðir hjá fólki. Samstundis verður arbeitt við at laga skipanina so, at hon eisini kann útgreina samskifti millum ymsar myndugleikar. Tí eisini teir skulu verða undir eftirliti í framtíðini.



# Russiskir ræðuleikar og vesturlendsk gloymska

Millum 23 og 30 milliónir fólk lótu lív undir harðrendum kommunistiskum valdi í Russlandi. Tað er ein av niðurstøðunum í bókini »Gulag og glemsel« eftir Bent Jensen. Í bókini finst hann harðliga at teimum, sum heilhugað stýðjaðu kommunismuna. Nú skrivar hann frágreiðing fyri Føroya landsstýri

GULAG OG GLOYMSKA
*Ingi Rasmussen*

»Nazisman var ein parantes.«

Mong hvukku við, tá ein løgtingsmaður herfyri fekk seg at siga soleiðis í einum hørðum orðadrátti í Løgtinginum. Kanska var kjakið, sum stóðst av útsøgnini, eitt fyrivarni um, hvat vit kunnu vænta okkum, tá kanningin eystanfyri av Føroyum undir kalda krígnum sær dagsins ljós.

Kanningini stendur danski søguprofessarin Bent Jensen fyri, og orsøkin til óhepnu lýsingina hjá løgtingsmanninum av nazismuni er seinasta bókin hjá professaranum, ið nevnist »Gulag og glemsel«.

Bókin, sum er úrslitið av granskingini hjá Bent Jensen gjøgnum nógv ár, umrøður russiska sorgarleikin og vesturlendsku gloymskuna í 20. øld. Við støði í nýggjum tilfari, sum Bent Jensen hevur gravað fram eftir drúgvar skjalarannsóknir í russiskum skjalagoymslum, skjalprógvar hann, hvussu avgerðir um fólkamorð vórðu tiknar og førdar út í lívið undir kommunismuni, og hvørjar avleiðingar tær fingu fyri milliónir av ósekum fólkum.

Longu undir kollveltingini byrjaði ein útreinsing, sum hevði til endamáls at gera marxistisku utopiina til veruleika. Úrslitið bleiv tað størsta evropeiska fólkamorðið í 20. øld, sum fær onnur ræðustýri at blikna afturímóti.

### Milliónir í skugganum

Enn tann dag í dag stendur kommunistiska fólkamorðið í skugganum á nazismuni, hóast tey bæði stýrini vóru ræðandi eins í tankagongd, samskipan og atferð.

Bent Jensen telur upp og kemur til, at millum 23 og 30 milliónir fólk lótu lív undir Sovjetkommunismuni. Sostatt leggur hann seg miðskeiðis ímillum teir mest svartskygdu granskararnar, ið halda uppá, at upp í 40 milliónir fólk vórðu myrd, og teir sokallaðu revisjonistarnar, sum eru niðri á nógv lægri tølum.

Eru granskarar ósamdir um tølini, eru teir kortini samdir um í dag, at talan var um ein miðvísan politikk at týna lív, sum byrjaði frá fyrstu døgunum hjá Lenin og øðrum kammeratum, tá hungursneyðin tilvitað varð løgd til rættis, og fólk í hópatali vórðu myrd.




### Tann góði heimurin

Bókin er óhugnaligur lesnaður, og Bent Jensen dylur ikki, hvar hann sjálvur stendur. Nógv hava hildið, at útreinsingin ikki tók dik á seg, fyrr enn Stalin kom til, men bókin vísir, at Lenin eitt nú beinleiðis gav ordrar til at drepa kulakkarnar, ið royndu at muta ímóti harðligu framferðini hjá bolsjevikkunum.

Farið verður upp í gjøgnum søguna, har drápini av bóndum, hungursneyð, fanga- og arbeiðslegur og avrættingar kravdu síni offur. Men hvussu lat alt hetta seg gera? Tað var sjálv tankagongdin aftanfyri, svarar Bent Jensen. Ein grundleggjandi fatan, at tað finnast góð og ring menniskju. Trúgvin uppá, at tað bar til at draga himmalin niður á jørðina. At tað bar til at fáa ein góðan heim uttan óndar verur. Tankin var at uppbyggja sosialismuna, og tí máttu allar kapitalistiskar og borgarligar forðingar útruddast um alt hermótið.

Alt skuldi vera nýtt, ungt, modernað og reint – bæði menniskju, verksmiðjur, landbúnaður og stovnar. Tað skitna og taktiska politiska spælið, tann demokratiska parlamentarisman, skuldi avloysast av einum stýri fyri tey reinu í hjartanum.

Fyri at hetta skuldi lata seg gera, skuldu ómenniskjuni fáast burtur. Í so máta var lítil munur millum kommunismuna og nationalsosialismuna í praksis. Jørðin var dálkað av skitnum smittuberarum og samfelagsbólkum, sum máttu týnast fyri at fáa ein betri heim. Og ætlanin var at fáa kollveltingina út til allan heimin.

Hitler, Himmler, Lenin og Stalin vóru yvirgartnarar í mannaurtagarðinum, sum var fongdur við ókrúti, sigur Bent Jensen.

### Bøðlanna heppikór

Í vesturheiminum vóru nógv, sum hildu væl standa til í Russlandi, hóast tey vóru væl kunnað. Propaganda, var aftursvarið, tí nógv vildu trúgva upp á ein góðan og rættvísan heim.

Tað var lagnutungt, heldur Bent Jensen, at so nógv í vesturheiminum ikki sóu russiska veruleikan í eyguni. Og tað hevur verið nívandi, at so nógv hava hildið, at royndirnar at gera hugsjónirnar hjá Marx til veruleika hava verið meira áhugaverdar enn milliónirnar av mannalívum, sum tær kostaðu.

Lenin vildi í 1917 reinsa Russland fyri dálkað menniskju, og hann kom væl áleiðis, áðrenn hann doyði í 1924. Stalin helt fram og útbygdi hetta stórbæra og niðurbrótandi reinsiverkið, sum í 1930-árunum meiðslaði Russland. Og í 1953, umleið 35 ár eftir kollveltingina, legði Stalin upp til enn eina útreinsing av øllum jødunum í Sovjetsamveldinum.

Alt hetta kundi bara henda, um fólk vóru býtt upp í bólkar. Og hóptýningin av dálkaðum fólkum varð stuðlað av donskum og øðrum heppikórum av intellektuellum í vesturheiminum, sigur Bent Jensen.

### Eftir føroyskum skjølum

Hvat hevur hendan tankagongdin hjá Bent Jensen við okkum at gera, kunnu vit so spyrja. Jú, sami maðurin er settur at kanna støðu Føroya í kalda krígnum eystanfyri.

Í Føroyum vóru eisini fólk, sum heilhjartað stuðlaðu kommunismuni. Og sambært Bent vóru hesi eins samsek og tey samhugaðu hjá nasistunum undir øðrum heimsbardaga.

Óvist er, um nøvn verða nevnd, tá hann hevur grópað seg lidnan eftir skjølum við føroyskum innihaldi. Men Jyllands-Posten hevur longu gjørt sær ta niðurstøðuna. Tann 7. november 2002 var yvirskriftin í blaðnum: »Færøsk venstrefløj under lup«. Í greinini verður eisini sagt, at kanningin hjá Bent Jensen hevur til endamáls at »afdække, hvem på Færøerne der gik Warszawapagtens ærinde«. Við øðrum orðum: Hvørji vóru í føroyska heppikórinum? Skjalarannsóknin eystanfyri av kalda krígnum kann geva eitt heitt føroyskt vár.

## Fakta

**Deyðsoffur fyri kommunismuni í Sovjet**

1. Borgarakríggið 1918-1922: 12-17 milliónir.
2. Av-kulakisering (dráp av sjálvognarbóndum) 1930-1933: 0,5-06 millónir.
3. Hungursoffur 1932-1933: 6,7 milliónir
4. Gulag-offur 1930-1953: 4-5 milliónir offur av teimum uml. 20 milliónunum, sum sótu í legum.
5. Avrættað við skoti: 1-1,5 milliónir offur.